# Lønin skal niður við 20 prosentum

Í eini roynd at sleppa burtur úr fíggjarligu trongstøðuni hava Todi Jónsson og FCA lagt uppskot fyri felagið hjá fótbóltsspælarum í Danmark. Uppskotið gongur út uppá, at lønirnar hjá spælarunum í FCA verða lækkaðar við einum fimtingi ella 20 prosentum. Enn er talan bara um eitt uppskot, sum nú skal viðgerast. Viðmerkingarnar frá spælarunum í felagnum eru, at um talan skal gerast um lønarlækking, so skal ein ætlan leggjast fyri spælararnar, sum skal vísa, hvussu felagið fer at fáa tingini at hanga saman 2-3 tey næstu árini.



# Neistin og VÍF spæla av nýggjum

Dimmalætting veit at siga, at dysturin millum Neistan og VÍF skal spælast av nýggjum. Dysturin varð upprunaliga spældur 18. januar, og høvuðsstaðarfelagið vann við 38-37. Vestmenningar kærdu, tí teir mettu, at eitt mál í seinastu sekundunum av fyrra hálvleiki varð tikið frá teimum í steðginum. Og teir hava fingið viðhald frá kappingarnevndini, sum hevur gjørt av, at dysturin skal spælast av nýggjum. - Vit eru triði partur í málinum, og vit hava einki skeivt gjørt. Tað eru vestmenningar, sum kæra eina avgerð hjá dómarunum, men tað rakar okkum, sigur Kjartan Thomassen, formaður í Neistanum, við Dimmalætting.



*Greipuvinnararnir hjá ÍF. Aftast frá vinstru: Hans Toftegaard, Dánjal Vang, Jan Ellingsgaard, Boban Ilic, Brian Poulsen og Eyðun Laksafoss. Fremst frá vinstru: Bárður Jacobsen, Høgni Madsen, Áslakkur Reinert Petersen, Rúni Weihe*

*Mynd: Brian Poulsen*

ÍF-Mjølnir 3-1 (13-25, 25-22, 25-19, 25-18)

# ÍF fekk gullið fríggjakvøldið

**Hóast menninir hjá ÍF hava ein dyst eftir í Eikliguni, fingu teir fríggjakvøldið gull og steyp handað eftir dystin á Kambsdali ímóti Mjølni, sum var seinasti heimadysturin hetta kappingarárið. Og ÍF vann enn eina ferð…**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Fuglfirðingar hava gjørt bart í mansflogbóltinum í vetur. Longu eina viku undan steypafinaluni, sum teir eisini vunnu, høvdu teir tryggjað sær føroyameistaraheitið, ið er eitt tað mest sannførandi í áravís.

Tað fekk formannin í Flogbóltssambandinum, Magnus Tausen, at heita á ÍF um ikki at skunda sær so nógv eina aðru ferð, tí tað hóast alt er stuttligari, tá spenningurin sleppur at halda sær eitt sindur longri.

Magnus Tausen var fríggjakvøldið komin á Kambsdal at handa monnunum hjá ÍF silvurmerki og steyp, tí fuglfirðingar høvdu ynskt at fáa hetta avgreitt í seinasta heimadystinum, heldur enn at bíða til eftir seinasta umfar, sum verður á útivølli.

Umframt flogbóltsformannin segði eisini varaborgarstjórin í Fuglafjarðar kommunu, Dánjal Vang, nøkur orð, har hann fegnaðist um, at ÍF við flogbóltinum hevði borið fleiri sigrar til kommununa, sum eisini heiðraði greipuvinnararnar við einum kekki.

### Byrjaðu kaldir

Ikki kann sigast, at fyrireikingarnar hjá ÍF vóru tær bestu til júst henda dystin fríggjakvøldið, sum var ímóti Mjølni. Teir í ÍF væntaðu ikki at fáa høllina fyrr enn klokkan 19, tá dysturin skuldi byrja, so teir møttu ikki fyrr enn eitt korter áðrenn.

Men tá hevði høllin longu verið tøk so mikið leingi, at klaksvíkingarnir høvdu hitað upp í næstan trý korter. Tí vóru teir í Mjølni eisini nógv klárari frá byrjan og vundu burtur úr køldu greipuvinnarunum í fyrsta settinum, heili 25-13!

Tá var farið at ornað í monnunum hjá ÍF, sum máttu stríðast eitt sindur fyri at vinna annað sett, men annars gjørdu bart í teimum báðum síðstu settunum og vunnu dystin 3-1.

Mjølnir, sum byrjaði kappingarárið sera illa og ongan dyst vann í fyrru kappingarhálvu, men síðani hevur háløð seg upp á bronsuplássið, royndi at berjast ímóti yvirvøldini, men mátti boyggja seg fyri betra og breiðara ÍF-spælinum.

### Rúni framúr

ÍF hevur alt kappingarárið víst dygdir, ið rættvísgera framúrskarandi úrslitið. Liðið tapti í fyrsta dystinum, sum var á útivølli ímóti SÍ, men hevur síðani ikki hugt aftur um seg og vunnið alt.

Eingin ivi er um, at størsta munin ger tað, at Rúni Weihe er á liðnum, tí hann hevur veruliga verið ein styrkur. Árini í Norra var hann nógv darvaður av skaða, men fleiri siga, at hann ikki hevur spælt betri fyrr, enn hann í vetur hevur gjørt tað við ÍF.

Saman við spælandi venjaranum, Boban Ilic, hevur hann verið størsta hóttanin hjá ÍF, sum tó hevur víst seg at havt størri breidd og styrki enn bara teir báðar. Og við fleiri ungum spælarum á veg kundi hent seg, at ÍF við hesum greipuárinum ikki bara hevur gjørt ein einsamallan vørr.

SÍ-Fleyr 3-2 (17-25, 25-23, 24-26, 25-20, 15-11)

# SÍ frá greipu til silvur

**Flogbóltsmenninir hjá SÍ hava hetta kappingarárið í Eikliguni verið noyddir at tikið til takkar við at síggja ÍF framman fyri seg. Men sigurin á Fleyr sunnudagin tryggjaði so SÍ eisini at fáa silvur í landskappingini.**

FLOGBÓLTUR
*Hilmar Jan Hansen*
*einslistir@kallnet.fo*

Ikki kann sigast, at líka væl hevur ligið fyri hjá mansliðnum hjá SÍ í ár, sum tað gjørdi í fjør. Tá fekst greipan til høldar, men hesa ferð gjørdist tað til silvur í bæði steypakappingini og landskappingini.

Ein frágreiðing er kanska, at týðandi spælarar hava verið burturi. Jón Nielsen var bara við ein dyst, áðrenn hann skifti til Fleyr, og so hava bæði Jóhan Petur á Stongum og Jón Joensen verið burturi við skaðum.

Í øllum førum hevur ikki ligið so væl fyri hjá SÍ í ár sum í fjør, og tí gjørdist tað mesta av kappingarárinum hesa ferð ein tilvera í skugganum av fuglfirðingum, sum fóru avstað við øllum.

### Skiftust um settini

Silvurið í steypakappingini hevði liðið longu fingið, áðrenn Fleyr kom á vitjan í Sørvági sunnudagin. Men tað skuldi altso ein fimmsettari til, áðrenn SÍ kundi eiga vissu fyri, at silvurkrónurnar í landskappingini komu upp á pláss.

Fleyr legði bragdliga fyri og tók fyrsta settið sera sannførandi. SÍ læt fleiri av teimum yngru og óroyndaru fáa kjansin, og teir fótaðu sær ikki fyrr enn í øðrum setti, sum SÍ vann. Men longu í triðja setti svaraði Fleyr væl aftur, og hetta gjørdist javnasta settið í dystinum.

Í fjórða setti kom meira ferð á spælið hjá SÍ, og tað rakk til at fáa fimta settið, ið somuleiðis var vunnið. Hesi bæði síðstu settini var tað serliga miðjuspælið hjá SÍ, ið gjørdi munin.

Bert ein dystur er eftir, sum forrestin er á heimavølli ímóti greipuvinnarunum úr Fuglafirði, men greitt er, at hóast Mjølnir kann fáa SÍ aftur í stigum, er settmunurin so stórur, at silvurið eftir seinasta dystin verður handað sørvingum.



### EIK-ligan, menn

| | | dystir | v | - | t | vunnin sett | tapt sett | settmunur | stig |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | ÍF | 11 | 10 | - | 1 | 32 | 12 | 20 | 15 |
| 2 | SÍ | 11 | 6 | - | 5 | 24 | 21 | 3 | 8 |
| 3 | Mjølnir | 11 | 3 | - | 8 | 16 | 29 | -13 | 6 |
| 4 | Fleyr | 11 | 3 | - | 8 | 16 | 26 | -10 | 3 |